FØÐINGAR

12. juli fingu Barbara Danielsen og Havgrímur Johannessen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3820 gr.

15. juli fingu Nancy Hentze og Karl Oddmar Rasmussen, Argum, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2700 gr.

15. juli fingu Hjørdis og Hans Óli Viberg, Jakobshavn, Grønland, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4155 gr.

15. juli fingu Naina Jacobsen og Finnbjørn Zachariasen, Hvalvík, eina dóttur. Hon var 57 cm long og vigaði 3850 gr.

15. juli fingu Hansina Debes og Knud Fabricius, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3400 gr.

17. juli fingu Katrin Jørgensen og Per Joensen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4100 gr.

18. juli fingu Gunnvá Vang, Tórshavn, og Jógvan í Toftum Olsen,Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3400 gr.

18. juli fingu Billa Simonsen og Pauli Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3250 gr.

18. juli fingu Beinta og Magni Isaksen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3240 gr.

ANDLÁT

11. juli
Gunnar Frits Tauser, ættaður úr Havn, búsitandi í Vági, 65 ár.
Óli Yde Olesen, Tórshavn, 63 ár.

12. juli
Hanna Magnussen, Tórshavn, 91 ár.
Lena Kambsdal, ættað úr Fuglafirði, 57 ár.

13. juli
Karl Poulsen, Sumba, vanliga nevndur Karl hjá Sakanum, 83 ár.
Frida Olsen, Kunoy, 81 ár.
Ann Britt Schrøter, Tórshavn, fødd Højgaard, 66 ár.
Ida Mørkøre, Tórshavn, 91 ár.
Thorleif Knudsen, Værløse, 75 ár.
Anna Kristina Parce, fødd Christiansen, vanliga nevnd Dinna, ættað av Krønni á Skála, búsitandi í London, 80 ár.

14. juli
Svend Niclasen, vanliga nevndur Svend hjá Justines, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Havn, 69 ár.
Meinhard Steffensen, Árnafjørður, 80 ár.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 20. juli: Karen Olsen, tlf. 441086
Sunnudagin 21. juli: Karen Olsen, tlf. 441086

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur
8. sunnudag eftir Trinitatis
Havnar kirk: Henning Nielsen kl. 11
Vesturkirkjan: Heri Joensen kl. 11
Kirkjubøur: Heri Joensen kl. 12.15
Hestur: Bergur D. Joensen kl. 12
Selatrað: Jógvan Friðriksson kl. 11
Hvannasund: Elda Funding kl. 12, altargongd
Friðrikskirkjan: Martin R. Jacobsen kl. 11
Christianskirkjan: lestur kl. 11
Eiði: Emil Olsen, kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa
Hvalvík: Bjarni Bæk kl. 12
Sandavágur: Inga Poulsen Dam kl. 11
Søldarfjørður: Meinhard Bjartalíð kl. 11, altargongd
Tvøroyri: Ólavur Rasmussen kl. 11
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 12.30
Sandvík: Ólavur Rasmussen kl. 14.00

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11.00: Gudstænasta, Per Eivind Stig talar.
Mánakvøldið kl. 20.30: Bønarmøti.

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Tom Skaale.

Adventkirkjan
Frá leygardegi 13. juli og til og við 10. august verður farið í kirkju kl. 11.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskt møti, kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Hebron, Argir
Heimasíðan: www.hebron.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Sam Jacobsen, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Vinjard Magnussen, kl. 22.00: Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúli.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

Keldan, Skálafirði
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Hans Jacobsen.
Vælkomin í Kelduna: www.keldan.fo

Frá Lívsins Orð
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 í Íslandsteaminum og evangeliskt møti kl. 17.00.

Heimamissiónin
Heimamissiónin hevur útimøti í Leirvík leygardagin kl. 19.00. Eftir útimøtið verður sang- og vitniløta í missiónshúsinum.

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl. 18.00 við Kel Steiner, YWAM leiðara í Svoríki.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18.00 er møti v/ Per Eivind Sti.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Hallur og Helenu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vági
Leygarkvøldið kl. 20.00: Útimøti í Lopra um viðrar.
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ Eingrím og Eddie.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskur fundur, kl. 21.00: Útifundur, um viðrar.
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

Eliaskirkjuútferð
Útferð til Gásadals fyri fyrrverandi og núverandi útisetum verður leygardagin 20. juli. Tilmelding á email: nansiogjan@kallnet.fo ella tlf. 33 23 15 aftaná kl. 18:00

Felagið Tórshavn: Gongutúrur
Sunnudagin 21. juli kl. 10.30 verður gongutúrur niðan á Oksagilshála, Heygamúla og Hvalvíksskarð. Farið verður av Kunningarstovuni. Tilmelding.

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður sunnudagin 21. juli. Gingið verður úr Fuglafirði niðan á Hús. Túrurin er miðal tungur. Vit møtast við Kunningarstovuna í Fuglafirði kl. 14.00. Tilmelding á Kunningarstovuni í Eysturoynni, tlf. 449449 og 444860. Teldupostur: infoey-r@post.olivant.fo og infoey-f@post.olivant.fo
Eysturoyar Gongufelag

Vága Gongufelag
Um viðrar verður farið niðan á Reynsatind sunnudagin 21. juli kl. 14.00. Byrjað verður av Hálsi. Havið góð gongulæði og matpakka við. Tilmelding á tlf. 213455.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 17. august hava vit opið frá kl. 13-17.
Á ólavsøku verða framsýningar í Tilhaldinum.
Á miðhæddini er ein fólkalívsmyndaframsýning og í kjallaranum ein hugleiðing í litum av kirkjubostólunum.
Opið verður 28., 29. og 30. juli kl. 16-20.
Somuleiðis verður møguleiki at keypa sær ein drekkamunn við ábiti.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundir verða í dag kl. 17.00–18.00, sunnudagin kl. 11.00–12.00 og mánakvøldið kl. 20.00 –21.00.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin,ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er stongd til 7. august 2002.

Ólavsøka í Esbjerg
Leygarkvøldið 27. juli verður ólavsøkudansur í Grønlandsparken 290 frá kl. 23.00 til 03. West & Blues (Hallur og Eiler) spæla. Kostnaður 50 kr. Høvi er at keypa breyð við føroyskum viðskera og drykkjuvørur.
Føroyingafelagið í Esbjerg

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Opið verður aftur týsdagin 20. august 2002.

TILTØK

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá mánadegi 8.7.02 til mikudagin 31.7.02.

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til umboð í starvsnevndini fyri øksinevndunum, ið siggjast á heimasíðuni, www.javni.fo
Fax: 310557 · Teldupostur:
javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið,
Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfrið Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lykliringar, føðingardagskort og peak flow meter.

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
8.7.-14.7. Bert telefonviðtala.
15.7.-21.7. Stongt.
22.7.-4.8. Bert telefonviðtala.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Friði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

Føroyingafelagið í Reykjavík
Elin S. Wang, Melabraut 8,
170 Seltjarnarnes, Ísland
Tlf. +354 5522368
E-mail: forrek@visir.is

Silvurbrúdleyp

Í sambandi við silvurbrúdleypsdag okkara týsdagin 23. juli hava vit opið hús í B36 húsinum sama dag millum kl. 10.00–15.00. Familja, vinir og kenningar eru hjartaliga vælkomin.
Sonja & Høgni Mikkelsen

24. juli kunna hjúnini Friðbjørg og Kaj Meinhard Michaelsen Klaksvík halda silvurbrúdleyp. Opið hús verður frá kl. 18,00, lýst verður til vælsignilsi í Christianskirkjuni kl. 16.00.

Týsdagin 13. august 2002 kunnu hjúnini Elin og Kári Danielsen í Tórshavn, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 10. august í HB-Húsinum kl. 19.00. Tey ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 318989 ella 218989 áðrenn 1. august 2002.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Tí Harrin kennir veg teirra rættvísu, og vegur teirra gudleysu ber av leið!

Sálmur 1,6

Tvinnir eru vegirnir og tvinni eru málini. Tað er Guds vegur og vegur illamanns. Hetta sigur kristna trúgvin okkum. Lívsins vegur ber heim til Guds á himni, meðan deyðans vegur ber glatan við sær. Og vit ganga sum menniskju eftir einum av hesum vegum. Ein tríði møguleiki finst ikki. Og ein uttanveltað støða finst heldur ikki. Tað er Gud ella illimaður, livi ella deyði og frelsa ella glatan. Men vit vórðu í okkara heilagu dópsstund sett at ganga eftir lívsins vegi. Og bara tí at Jesus leiðir okkum, kunnu vit koma á mál. Hin gudleysi hevur einki mál og mið. Og leið hansara ber móti glatan. Men vit, sum kalla okkum kristin, eiga at vita, at vit ikki kunnu geva okkum sjálvum æruna fyri, at vit ganga lívsins veg. Guds er tøkkin og æran. Vit finna ikki sjálv lívsins veg. Jesus má leiða okkum inn á henda veg. Og tað gjørdi hann í dópinum, og so kom trúgvin og staðfesti dópsins lyftir fyri okkum. Vit vórðu sannført til trúgv og til frelsu. At sannføra er andans uppgáva. Og at finna lívsins veg er givið okkum av Gudi. Trúgv og frelsa eru Guds góðu gávur til okkara. Og vit, sum kalla okkum kristin, eru sett ikki bara at trúgva; men eisini at inna rættvísi og verða íðin fyri sannleikanum. Vegirnir eru bert tveir. Ein tríði vegur finst ikki. Men vit kunnu takka Gudi fyri, at hann gav okkum at ganga lívsins veg. Bara hesin vegur ber á mál. Takka Gudi tínum fyri, at hann leiddi teg inn á henda veg – lívsins veg.

David Johannesen

BRÚDLEYP

Í dag, 20. juli, kl. 16.00 giftast í Viðareiðis kirkju Rudi Heinesen av Viðareiði og Teitur Samuelsen úr Havn. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00.

Í dag, 20. juli, kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Grete Grønning, Norra, og Eigil Müller, Porkeri. Veitslan verður kl. 19.00 í VB-húsinum fyri innbodnum.

Í dag, 20. juli, kl. 13.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Birgit Arge Sólbjørg og Anthoni Viggoson Hansen, Runavík. Veitslan verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum fyri innbodnum.

Í dag, 20. juli, kl. 14.30 giftast í Skála kirkju Jannet Jacobsen, Skála, og Terji Poulsen, Tórshavn. Brúdleypið verður hildið í Bygdarhúsinum í Lorvík kl. 18.30 fyri innbodnum.

Í dag, 20. juli, kl. 15.00 giftast í Skopunar kirkju Maj-Britt Winther Hentze, Skopun, og Erling Jacobsen, Syðrugøtu. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Bygdarhúsinum Samljóð í Skopun.

Í dag, 20. juli, kl. 17.00 giftast í Gjáar kirkju Friðrika Mortensen og Jóhan Kristiansen, Gjógv. Veitslan verður fyri innbodnum í Gjáar bygdarhúsi.

Í dag, 20. juli, kl. 18.00 giftast í Dómkirkjuni Gudni Jacobsen, Nólsoy, og Kenneth Olsen, Tórshavn. Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 20.00 fyri innbodnum.

Í dag, 20. juli, kl. 14.00 giftast í Nebo á Toftum, Klara í Túni, Toftir og John Jakobsen, Saltangará. Veitsla verður fyri innbodnum í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum kl. 18.30.

Í dag, 20. juli, kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Marianna Birgitta Jacobsen, Tórshavn og Finn Hansen, Nólsoy. Veitslan verður í B36 húsinum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 27. juli kl. 16.00 giftast í býráðshúsunum í Klaksvík Ingun Petersen, Klaksvík, og Tummas Sjúrðaberg, Leirvík. Veitsla verður fyri innbodnum í Skálanum í Klaksvík kl. 19.00.

27. juli kl. 14.30 giftast í Kunoyar kirkju, Elsebeth Vilhelm, Kunoy, og Jóhan Christiansen, Leirvík. Døgurðin verður eftir vígsluna fyri innbodnum, og frá kl. 20.00 verður opið hús í bygdarhúsinum í Kunoy, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 27. juli kl. 10.00 giftast í Vágs kirkju Rakul Nolsøe og Michael Berg í Lágabø, Vágur. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin til morgunmatar í VB-húsinum eftir vígsluna og ikki sum áður lýst, á Hotel Bakkanum.

Fríggjadagin 2. august kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Jóhanna Hansen, Norðragøta og Janus Thomsen, Toftir. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu siga frá á tlf. 441486 ella 447851 áðrenn 24. juli.

Leygardagin 3. august kl. 14.00 giftast í Hvannasunds kirkju Svanna Jacobsen, Klaksvík, og Livar Nysted, Hvannasund. Veitslan verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 452165 ella 265494 áðrenn 25. juli.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Jona í Lon (Jacobsen), Klaksvík og Eystan Joensen, Leirvík. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 457588, 217588 ella 262383 innan 20. juli.

Leygardagin 10. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Maria Hansen, Tórshavn, og Eyðun Dalsgarð, Argir. Dagurin verður hildin í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja á tlf. 315205 ella 315470 í seinasta lagi 25. juli.

Leygardagin 10. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Hallur Knudsen, Saltangará og Ragnhild Jensen, Sandur. Veitslan verður í B68-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. juli á tlf. 448655.

Leygardagin 17. august kl. 15.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Simona Blábjørg, Fuglafjørður, og Jóannes Poulsen, Lamba. Veitsla verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at hátíðarhalda dagin saman við brúðarparinum, verða biðin um at siga frá áðrenn 3. august á tlf. 444302, 447372 ella 251010.

Leygardagin 17. august kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Sólheim, Saltangará, og Egon Joensen, Sandavágur. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 322321 ella 264838 í seinasta lagi 26. juli.

Leygardagin 31. august kl. 16.00 giftast í Leirvíkar kirkju Beinta Eliasen, Leirvík og Høskuldur Einar Pálsson, Reykjavík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 321767 ella 443078 í seinasta lagi 15. august.